# Læraravegleiðing: 2.2.2. Sjónband um Lóggáva, eld og statik

**Tema**

- Lóggáva
- Eld
- Statik/burðardygd
- Endurnýtsla

**Mælt tíðarskeið**

- 25 min.

**Viður**

Undirvísingartilfar til skeið um endurnýtsluviður í bygging

## Innleiðsla

Í tilfarinum er eitt sjónband, sum leggur lóggávu fram viðvíkjandi eldi og statikki í mun til nýtslu av endurnýttum viði í bygging.
Endamálið við hesum sjónbandinum er at geva lærlinginum innlit í møguleikarnar at byggja við serligum evnum í endurnýttum tilfari, samstundis sum lærlingurin lærir um grundleggjandi reglur, sum mugu fylgjast.

Til sjónbandið er eisini gjørt eitt uppgávuark við spurningum, sum tryggja, at lærlingurin arbeiðir við viðkomandi evnum, sum gera tað møguligt at náa lærumálunum fyri tilfarið.

At enda verður vitanardeiling framd í felag í flokkinum, har lærlingurin fær møguleika at deila síni svar uppá spurningarnar í uppgávuarkinum og hugsa yvir innihaldið í sjónbandinum.

## Fyrireiking

<u>Lærarin skal:</u>

•Kunna um tilfarið/gongdina.

•Seta lærlingin í gongd við at hyggja at sjónbandinum.

•Hjálpa lærlinginum við at svara uppgávuarkið.

•Stýra vitanardeilingini og geva øllum luttakarum møguleika at siga síni svar frá uppgávurnar, koma við spurningum og viðmerkingum.

•Hjálpa til við at greiða svarini hjá luttakaranum og skriva tey upp sum felags floksviðmerking.

<u>Luttakarin skal:</u>

•Kunna síggja og hoyra sjónbandið.

•Kunna greiða frá (deila vitan) sínum svarum upp á spurningarnar í uppgávuni.

•Kunna lurta eftir øðrum luttakarum.

•Kunnu tekna/skriva viðmerkingar, sum gera tað møguligt hjá teimum at minnast sína vitan og sínar hugsanir.

# Læraravegleiðing: 2.2.2. Sjónband um Lóggáva, eld og statik

Skipan:

- Undirvísingin verður stuðlað ígjøgnum ein blandingi av sjálvstøðugt arbeiði og bólkaarbeiði. Luttakararnir kunnu luttaka í undirvísingini einsamallir ella í smærri bólkum.

## Læringamál

- Lærlingurin kann lýsa uppskot um endurnýtt træ og møguleikarnar fyri at fullfíggja tað í eina serstaka uppgávu (H2).
- Lærlingurin kann grundgeva fyri umstøðunum kring lóggávu viðvíkjandi eldi og statikki við nýtslu av endurnýttum træi.
- Lærlingurin hevur vitan um, hvussu trætilfar kann tillagast og viðgerast fyri at kunna verða endurnýtt ella endurvunnið í trækonstruktiónum (V1).

## Innihald og endamál

Endamálið við innihaldinum er at geva lærlinginum vitan um møguleikarnar at endurnýta trævørur, tá ið lóggávukrav um brunatrygd og statiskar umstøður skulu verða fylgdar.
Til sjónbandið eru fleiri spurningar, sum skulu svarast.

## Uppskot til undirvísingarætlan

Lærarin byrjar undirvísingina og leggur tilfarið/gongdina fram (5 min)

- Innleiðsla til heimasíðuna.

Sjónband (5 min)

- Lærlingurin hyggur at sjónbandið 2.2.2.

Uppgávur til sjónbandið (10 min)

- Eftir at lærlingarnir hava sæð sjónbandið, skulu teir arbeiða spurningum og loysa uppgávur tengdar til evnið, sum tryggjar, at lærlingurin skilur innihaldi tengt til lærumálini.

Samanumtøka í felag (5 min)

- Lærarin stýrir einari samanumtøku av teirri nýggju vitan, sum lærlingurin hevur fingið.

## Sundurgreining

Førleikin hjá luttakaran at fata og hugsa yvir innihaldið í sjónbandið og leita eftir vitan um evnið gevur møguleika at veita meira ella minni framkomin íkast til vitanardeilingina.

## Afturboðan og meting

Við hvørjum íkasti fær luttakarin beinleiðis feedback frá læraranum, tá lærarin hjálpir við at greiða frá grundgevingunum, áðrenn íkasti verður skrivað á talvuna. Luttakarin upplivir, at "góð" boð verða góðtikin og skrivað beinleiðis á talvuna, meðan ógreið/skeiv íkast verða endurtulkað saman við læraranum, áðrenn tey verða skrivað á talvuna.